# REGLUGERÐ

## Skráseting og gjald fyri gjaldskyldugt burturkast

Endurnýtslan

Tel 30 20 10 · www.torshavn.fo

Útgevari: Kommunala Brennistøðin
Umbróting og prent: Føroyaprent

Svanamerktur prentlutur 541 705

## 1. Heimild:

1.1. § 57 stk. 5 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008.

1.2. §§ 13 og 16 í kunngerð nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

## 2. Gildisøki:

2.1. Reglugerðin umfatar skráseting og gjald fyri gjaldsskyldugt burturkast úr Tórshavnar kommunu (hereftir stytt Tk), sum verður innlatið á móttøkuplássini hjá Kommunalu Brennistøðini (hereftir stytt KB).

2.2. Meginreglan er, at alt burturkast, ið ikki stavar frá vanligum rakstri av einum vanligum húsarhaldi, er gjaldsskyldugt, t.d., men uttan at vera úttømandi:

- Burturkast frá vinnuligum virksemi
- Burturkast frá almennum virksemi, herundir eisini kommunalt og statsligt virksemi.
- Burturkast frá frítíðarvirksemi, herundir ítróttur, mentan o.t.
- Burturkast frá nýbygging og størri umbyggingum/umvælingum av privatum og vinnuligum bygningum

2.3. Ikki – gjaldsskyldugt burturkast er burturkast, sum einans stavar frá vanligum rakstri av einum vanligum húsarhaldi, og treytað av, at talan er um smærri nøgdir, t.v.s. at tað kann avhendast í einum vanligum bili við lítlum anhangara (totalvekt av bili í mesta lagi 3500 kg, totalvekt av anhangara í mesta lagi 750 kg, og samlað totalvekt fyri bil + anhangara í mesta lagi 3500 kg).

2.4. Alt burturkast, ið verður innlatið í bilum størri enn 3500 kg, verður roknað sum gjaldsskyldugt, uttan mun til, hvar tað stavar frá.

2.5. Um ein vinnuligur bileigari koyrir og innletur burturkast fyri privat húsarhald, jvb. 2.3, skal eigarin av burturkastinum persónliga verða við ella hava givið skrivliga váttan um sín ognarskap av burturkastinum.

2.6. Tá ið privat húsarhald fáa veitt vinnuligar tænastur, t.d. byggitænastur ella útskifting av brúkslutum, sum eisini umfata burturbeiningina av burturkastinum, ið stavar frá tænastuni, verður hetta burturkastið roknað sum vinnuligt burturkast.

## 3. Allýsingar:

3.1. Skrásetingarskipan: Scanvægt vigi- og skrásetingarskipan

*Bileigari:*
Persónur, sum kann binda felagið, ið eigur bilin, sum burturkast verður innlatið við.

*Innlatari:*
Bilførarin á bilinum, sum burturkastið verður innlatið við.

*Gjaldari:*
Tann, ið verður faktureraður, ella sum skal gjalda kontant, fyri tænastuna frá KB. Gjaldari verður eisini nevndur debitorur.

*Ruskkelda:*
Virki, stovnur, felag, persónur ella stað, haðani burturkast upprunaliga stavar frá, og sum eigur og hevur ábyrgdina av tí inntil tað er innlatið á KB.

*Kundi:*
Gjaldari ella ruskkelda, t.v.s. eitt virki, stovnur, felag ella einstaklingur, ið eigur ella rindar fyri burturkast, ið verður latið inn til KB.

*Vøra:*
Burturkastslagið.

## 4. Skráseting av burturkasti:

4.1. Gjaldsskyldugt burturkast, sum verður latið inn á kommunalu móttøkustøðini fyri burturkast, skal skrásetast í skrásetingarskipan, tá ið tað verður latið inn.

4.2. Innlatarin hevur skyldu til at lata burturkastið skráseta.

4.3. Fyri hvørja innlating skal skrásetast:

| | |
|---|---|
| • (Innlatari velur): | Innlatari (bilur og bileigari) |
| • (Innlatari velur): | Gjaldari |
| • (Innlatari velur): | Ruskkelda |
| • (Innlatari velur): | Vøra |
| • (Skipanin ásetur): | Nettovektin av innlatna burturkastinum |
| • (Skipanin ásetur): | Dagfesting og tíðspunkt fyri avgreiðsluna |
| • (Skipanin ásetur): | Avgreiðslunummar (Ekspeditiónsnummar) |

## 5. Bileigarar, bilar og innlatarar

5.1. Bileigarar/innlatarar, sum regluliga lata inn gjaldsskyldugt burturkast, skulu lata seg skráseta sum bileigarar/innlatarar hjá KB. Skrásetingin verður gjørd á skrásetingarskjalinum "KB1: Skráseting av innlatarum", sum síðani verður innlagt í skrásetingarskipanina. Bileigarin útfyllir og undirskrivar eitt skrásetingarskjal vegna hvønn einstakan innlatara/bil.

5.2. Bileigarin hevur vegna innlataran ábyrgdina av, at innlatarin yvirheldur galdandi reglugerð.

5.3. Skrásettir bileigarar/innlatarar fáa eitt vigikort fyri hvønn innlatara/bil, sum skal nýtast í.s.v. skráseting av burturkasti. Vigikortið verður forprogrammerað sambært útfylta skrásetingarskjalinum.

5.4. Innlatarin hevur skyldu til at kenna og virða tær treytir, skrivaðar sum óskrivaðar, ið eru galdandi fyri burturkast v.m. á KB.

5.5. Innlatarar, ið heinta burturkast hjá ruskkelduni, skulu visuelt eftirkanna, at burturkastið lýkur galdandi treytir. Um ivamál er, skal ábyrgdarpersónur hjá ruskkelduni spyrjast.

5.6. Um innlatarin sær, ella á annan hátt fær kunnleika til, at burturkastið, ið hann skal heinta, ikki lýkur galdandi treyir, skal hann nokta fyri at heinta og innlata burturkastið til KB og skal kunna ruskkelduna um, hvat ið er galið og hvussu tað eigur at vera.

5.7. Innlatarin hevur skyldu til at viga burturkastið, velja rætta vøru, ruskkeldu og gjaldara, tá ið hann skrásetur burturkastið í skrásetingarskipanini hjá KB.

5.8. Innlatarin hevur skyldu til at skráseta hjá KB allar ruskkeldur, ið hann koyrir fyri, um tær ikki frammanundan eru skrásettar í skipanini hjá KB. Somuleiðis hevur hann skyldu til at skráseta nýggjar ruskkeldur, áðrenn hann byrjar koyring fyri hesar. Skrásetingin verður gjørd á skrásetingarskjalinum “KB2: Skráseting av ruskkeldum og gjaldarum”.

5.9. Innlatarin hevur skyldu til at ansa eftir, at ein tilhoyrandi gjaldari er skrásettur, áðrenn hann byrjar koyring fyri nýggjar ruskkeldur.

5.10. Um gjaldarin, sum sambært innlataranum skal gjalda fyri burturkastið, er sperraður ella á annan hátt ikki kann veljast, skal innlatarin í staðin antin velja sín egna bileigara sum gjaldara, gjalda kontant við gjaldskorti, ella fara avstað aftur við burturkastinum.

## 6. Ruskkeldur

6.1. Kundar, ið skulu burturbeina burturkast á KB, hava skyldu til at lata seg skráseta sum ruskkelda.

6.2. Ruskkeldan er eigari og ábyrgdari av burturkastinum inntil tað er innlatið á KB, og hevur skyldu til at halda galdandi ásetingar fyri burturkast.

6.3. Innlatarin, sum skal koyra burturkastið fyri kundan, hevur skyldu at kunna kundan um kravið um skráseting og skal avgreiða skrásetingini fyri kundan, um kundin ikki sjálvur avgreiðir skrásetingina.

6.4. Ruskkeldur verða skrásettar í skráseingarskipani hjá KB. Skrásetast skal:
- Navn á kunda
- Kontaktpersónur
- Telefonnummar
- Bústaður, har ið burturkastið verður heintað (Gøtunavn og –nr, býur/bygd),
- Postboks og postnr.
- V-tal
- Slag av virksemi

6.5. Um kundin hevur fleiri deildir, KANN kundin verða skrásettur sum fleiri ruskkeldur við ymsum bústøðum.

6.6. Um kundin hevur fleiri virksemisøki á sama bústaði, kann kundin skrásetast sum EIN ruskkelda, har ið høvuðsvirksemi verður skrásett.

6.7. Um kundin hevur fleiri ymisk virkisøki á ymsum bústøðum, SKAL kundin verða skrásettur sum fleiri ruskkeldur við ymsum virkisøkjum og/ella bústøðum.

## 7. Gjaldarar

7.1. Kundar, ið skulu gjalda fyri burturkast á KB, hava skyldu til at lata seg skráseta sum gjaldarar.

7.2. Gjaldarar verða skrásettir í fíggjarskipanini hjá Tk. Skrásetast skal:
- Navn á felagið/stovni/persóni
- V-tal

- Fakturabústaður ella elektroniskir gjaldsupplýsingar
- E-mail

7.3. Skrásettir gjaldarar síggjast við navn og nummar í gjaldarayvirlitinum á skrásetingar-terminalunum á KB.

7.4. Um ein gjaldari ikki longur hevur tørv á ella ikki ynskir at síggjast á skrásetingaryvirlitinum, kann hann biðja um at verða de-aktiveraður.

7.5. Fíggjardeildin hjá Tk hevur eftirlit við gjaldarum og kann sperra gjaldarar um neyðugt, t.d. vegna væntandi inngjald. Sperraðir gjaldarar síggjast ikki á terminalunum.

## 8. Gjald

8.1. Kundin rindar eitt gjald fyri innlatna burturkastið.

8.2. Gjaldið verður útroknað sum nøgd av innlatnum burturkasti (vekt (kg) ella rúmd (m3), ella stk.) faldað við eindarkostnaðinum (takstinum) fyri vøruna.

8.3. Tórshavnar býráð ásetur eindarkostnaðirnir fyri vørurnar (takstskrá), sum Føroya Landsstýrið skal góðkenna samsvarandi § 16 í kunngerðini um burturkast.

8.4. Eindarkostnaðirnir (takstskráin) verða kunngjørdir á heimasíðuni hjá Tk og við uppslagi á KB.

8.5. Innlatarin skrásetur við innlating ein gjaldara, sum innlatarin hevur gjørt avtalu við um at gjalda fyri burturkastið.

8.6. Gjaldið verður faktureráð til gjaldaran og fakturi sendur gjøgnum rokningadepilin.

8.7. Um trupulleikar standast av, at gjaldarin ikki kennist við veitingina og ikki vil gjalda, heftir innlatarin fyri gjaldið.

8.8. Innlatarin kann eisini gjalda kontant við gjaldskorti.

8.9. Um burturkastið ikki lýkur galdandi treytir, t.d. tí tað ikki er rætt skilt ella ikki lýkur støddarásetingar, kann KB áleggja eitt eykagjald.

## 9. Undantøk

9.1. KB kann undantaka smærri kundum, ella kundum, sum ikki innlata burturkast regluliga, kravinum í pkt 4.3 um skráseting av vekt, og í staðin skráseta rúmd ($m^3$).

9.2. KB kann, um skráseting av vekt elvir til ferðslu- ella logistiktrupulleikar, undantaka ávísum kundabólkum kravinum í pkt 4.3 um skráseting av vekt, og í staðin skráseta rúmd ($m^3$).

9.3. Um tekniskir ella aðrir trupuleikar eru við skrásetingarskipanini, t.d. kavi og frost, kann skráseting av nøgd gerast eftir rúmd í staðin fyri eftir vekt.

9.4. Avgrevstur, sum verður latin inn á tyrvingarplássið í Húsahaganum, kann skrásetast eftir rúmd ($m^3$) í staðin fyri eftir vekt.

## 10. Revsing

10.1. Brot á hesa reglugerð kann revsast sambært § 72 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd.

10.2. Um innlatarin ikki yvirheldur galdandi reglugerð, kann innlatarin missa rættin at innlata burturkast á KB.

10.3. Er talan um grovt ósketni, sum kann hava við sær fíggjarliga avleiðing fyri KB ella annan kunda, t.d. við at innlatarin velur skeiva vøru, skeivan gjaldara, vigar skeivt ella als ikki skrásetir/vigar, kann KB útihýsa innlataran alt fyri eitt og uttan ávaring.

10.4. Um bileigarin ikki yvirheldur skyldu sína, kann hann missa rættin at lata inn burturkast fyri allar sínar bilar/innlatarar.

10.5. Um ruskkeldan ikki yvirheldur treytirnar, sum eru galdandi fyri burturkast, kann ruskkeldan missa rættin at fáa burturkastið viðgjørt á KB.

10.6. Tá ið bileigari, innlatari ella ruskkelda missa rættin at lata inn burturkast, verða tey strikaði í skrásetingarskipanini og tilhoyrandi kort de-aktiveraði, so ikki ber til at velja hesi á terminalunum.

## 11. Gildiskoma

11.1. Hendan reglugerð er samtykt í Tórshavnar býráð tann 23. februar 2012.

11.2. Reglugerðin kemur í gildi tann 1. apríl 2012, ella so skjótt sum at allar teknisku skipanirnar eru klárar og at takstskráin er góðkend av Føroya Landsstýri.